

*Jákup Olsen egndi eisini so trúliga fyrrapartin í gjár*

# – Í lagi við 100 pundum uppá stampin

**Magnus í Hjøllum á Toftum eigur útróðrarbátin Beinta. Árið í fjør royndist brúkiligt, og teir eru komnir hampiliga væl í gongd í ár.**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Toftir:** Tað er bítandi kalt her á havnalagnum á Toftum. Vindurin følist nívandi kaldur, og tað er kavi og ælingur allatíðina. Hetta er ikki ein útidagur fyri sartar sálir, henda vetrardagin í gjár. Her á havnalagnum standa fleiri skúrar, og inni í einum teirra – tí uttasta – er lív og virksemi. Og har er eisini heitt.

Inni í hesum egningarskúrinum standa nakrar mans og egna. Her er talan um tríggjar mans í ymiskum aldrum. Og um ein drong sum ikki er meiri enn 15 ára gamal.
Teir egna allir hjá Magnus í Hjøllum, sum eigur 29 fót Starlett–bátin "Beinta", sum er heimahoyrandi á Toftum.

## Brúkiligt í 2005

Enn er nýggja árið bara fáar dagar gamalt, men um Magnus lýtur aftur á tað farna, so er hansara meting greið:

– Tað var eitt brúkiligt ár, sigur hann.

Sjálvur stóð hann í heita egningarskúrinum og egndi ein stamp fyrapartin ígjár. Tað ræður um at hanga í, tá ein veruliga skal tosa um útróður.

Eins og hjá so mongum øðrum útróðrarmanni, ið hevur hetta sum sítt starv burtur, so er tað altíð ein spurningur, um og nær ein er nøgdur við úrslitið.

– Ein er sjálvandi ongatíð nøgdur, tí ein vil altíð hava eitt sindur aftrat!

Magnus er liðugur við henda eina stampin. Hann leggur lokið á og fer við honum inn í ta køldu goymsluna aftanfyri.

So er hesin ikki eftir. Nú er ein stampur minni at egna til túrin, sum væntandi skuldi verða sama kvøld – t.v.s. í gjárkvøldið.
Teir royna at egna sum mest sjálvir, og hava tí ikki so nógv brúk fyri hjálp uttanífrá.

## 2300 pund

Enn veit eingin, hvat hetta nýggja árið fer at merkja fyri veður og útróður, men Magnus hevur kortini góðar vónir fyri árið.

Tað hevur ikki viðrað nakað serligt higartil í ár, men tá líkindi hava verið, hevur Magnus verið til útróðrar.

– Vit hava verið tvær ferðir úti í ár. Vit hava sett 20 stampar í alt, og tað gav 2300 pund.

– So tú skilir, at tað var ikki av tí grova, sigur hann. Fyrrapartin í gjár riggaðu teir sum nevnt til at fara á triðja túrin í ár. Gekst sum ætlað løgdu teir frá landi í gjárkvøldið.

– Vit vóna, at fáa ein stuttan túr í nátt, sigur Magnus.

Saman við sær hevur Magnus sonin og í løtuni ein ungan drong, Búa, sum eru í starvsvening hjá honum!

## Melur runt

Beint hevur so verið tveir túrar higartil í ár, og hava teir fingið um 100 pund uppá stampin.

– Um tað er nøktandi?! Tja, tað er so brúkiligt fiskarí. Fer tað ikki niður um 100 pund, so melur runt, sigur hann.

Nú teir egna so brúka teir makrel og høgguslokk. Tað plagar at roynast væl.

– Onkutíð so egna vit eitt sindur av gággu uppí eisini. Tað er nokkso vanligt at blanda agnið.

– Hetta er líkasum at fara í býin. Tú skal hava eitt sindur at velja ímillum!, sigur Magnus við einum brosi.